**ÚTSØLA AV MÓTAKLÆÐUM FRÁ GREEN HOUSE**
Vælumtóktu mótaklæðini frá Green House fært tú á Láarvegi 26 í Tórshavn. Frá mikudegnum 5. januar til fríggjadagin 14. januar 2005 selja vit øll klæðir við stórum avsláttri. Støkk inn á gólvið ella ring og avtala tíð. Opið er hvønn dag frá kl. 17.00. mail: saloma@post.olivant.fo
*Tlf. 219202 ella 315042*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
og jakki, Lilly model, stødd 36, til sølu fyri kr. 500,-
*Tlf. 517542*

## Samband

**EINLIGUR MAÐUR**
40 ár, saknar kvinnu, hon má vera millum 30-40 ár. Eg havi egna íbúð. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1993/1*

## Súkklur

**TIL SØLU**
6 súkklur til sølu. Ein spildurnýggj 26" mountainbike alustell, crom farva v/ 21 gearum. Ein Winter gentusúkkla 26
*1 stk. DBS damusúkkla 28" 1 Winter barnasúkkla v/ hjálpihjólum 200*

**CIQO PIAGO TIL SØLU**
Prutl við fótpedalum, 9 HKI innreg. Er í sera góðum standi, til sølu fyri 2.000,- Ein DBS 28" damusúkkla, ein Forza 16" gentusúkkla.
*Tlf. 252829*

**SKUTARI TIL SØLU**
Derbi GP1, árg. 2002, hevur koyrt uml. 5000 km, til sølu fyri 13.000 kr.
*Tlf. 503423*

**ER TAÐ NAKAR**
sum hevur ein yamaha Neo´s ella Aerox, ella eina Derbi send R. bíliga til sølu.
*Vinarliga ring á tlf. 261192*

**PUCH FLAGSKIB**
Er tað nakar, ið liggur inni við einari gamlari Puch knallert, árg. 1965-1978, flagskib (grønur tangi) MS ella VS, so eri eg áhugaður.
*Tlf. 217634*

**SÚKKLA TIL SØLU**
Ein 2 ára gomul súkkla til sølu fyri kr. 2000,- sær gott út og hevur 7 gear.
*Ring eftir kl. 16.00 á 243356*

**TIL SØLU**
1 1/2 ára gomul Aprilia RX50 í góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst. Áhugað kunnu ringja
*tlf. 263477*

**TIL SØLU**
Aprilia RS og RX50, báðar mangla útstød. Verða seldar saman fyri minst 16000 kr. Kunnu seljast hvør sær.
*Ring 255178*

**BARNASÚKKLA**
til 6-8 ár til sølu fyri 600 kr. Sær heilt gott út.
*Tlf. 527130*

## Teldur

**DVD BRENNARI**
(multi) Ret, Lg, til sølu fyri kr. 750,-
*Tlf. 260106*

**TELDA TIL SØLU**
Amd Athlon 1500+,512MB ram, 80GB hardisk, 19"skerm, sound blaster live! series 5.1, 4xDVD-brennari, Nvidia GeForce3 Ti200. Fyri 4000 kr.
*Tlf. 271982*

**GÓÐ SPÆLITELDA TIL SØLU**
Dell Dimension Pentium 4, 2.4Ghz, 120Gb Hardisk, 768Mb Ram, ATI Radeon 9800Pro, 128Mb, Tv-outSanta Cruz Turtle Beach 5.1 Ljóðkort, 19" M993 Skermur, 2 Hátalarar+Subwoofer, DVD-brennara+CD-brennara (2 drev), 3,5" Diskettedrev8 USB og 3 FireWire Stikk. Teldan er 2 ár og hevur tískil enn 1 ár garanti. Prísur einans 7.900,-.
*Áhugað ringið 508575*

**TIL SØLU**
3 guitarstativ til sølu.
*Tlf. 270429*

**FARTELDA TIL SØLU**
Toshiba windows XP 2002, intel pentium 4, mobile cpu 1.90GHz, 512 RAM, 40 Gigabyte harddisk, 10 mánaðar gomul. Til ein góðan prís, sí www.gottkeyp.com, síðani undir privatlýsingar. E-post: meinhardt@post.olivant.fo
*Tlf. 219886*

**TIL SØLU**
Ein telda 1900 mhz 512 ddr ram og ein skermur og tastatur alt fyri 3000 kr.
*Tlf. 745101*

**TIL SØLU**
Ein 160GB externur hardiskur er ongantíð brúktur fyri 1500 kr.
*Tlf. 745101*

**GÓÐ TELDA TIL SØLU**
1.7 GHz, 512 DDR Ram, 80 GB harddisk, Geforce 4, TI4800 SE, skermur, knappaborð og mús. Klárar øll spøl og forrit. Prísuppskot 6.000 kr.
*Tlf. 224736/422526*

**3DS MAX 6**
Training DVD set, orginal training í 8 tímar, til sølu fyri 3.500 kr. (5 mðr. gamalt). Nýtt 6.500,-
*Tlf. 219119*

**HYGG HER!**
Hevur tú trupulleikar við telduni? So vil eg fegin hjálpa. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 273865*

## Tónleikur

**EG HAVI EIN**
luftguitar til sølu, lítið brúktur og í sera góðum standi. Prísur 1.500 kr.
*Tlf. 229933, Jón*

**TIL SØLU**
Eitt surround anlegg av slagnum (LG) er til sølu fyri 5.000 kr. Nýprísur 6.000 kr. Tað er ein mánað gamalt.
*Tlf. 319806/250484*

## Út- & Sjónvarp

**PARABOL**
við dekodara bíliga til sølu.
*Tlf. 443131*

## Ymiskt

**PINNABRENNI**
Vit hava nógv pinnabrenni á lagri. Verkhúsið Stíggjur, tlf.448944 millum kl. 9.00-16.00.
*Tlf. 448944*

**TERMINALUR YNSKIST**
helst S3000 terminalur, men alt hevur áhuga.
*Tlf. 220720*

**VIÐFESTISVOGNUR**
Góður viðfestisvognur til sølu fyri kr. 3000.
*Tlf. 316510 ella 221248*

**FLOTT KABINETT**
til sølu, við Neon ljósið, og einari 400W streymveiting.sí http://heima.olivant.fo/~patur/kabinett/ einast kr 400,-
*Tlf. 221051*

**LOPPUMARKNAÐUR**
Reyði Krossur Føroya hevur loppumarknað leygardagin 15. januar frá kl. 10.00-14.30. Tikið verður ímóti smálutum og klæðum týs- og mikukvøldið 11. og 12. januar kl. 19-21. Ágóðin av søluni fer allur til Neyðhjálpina til Asia,og vóna vit vóna at síggja nógv fólk í Vágsbotni nr. 9.
*Reyði Krossur Føroya*

**KLÆÐNAINNSAVNAN TIL REYÐA KROSS**
Hvørt mikukvøld frá kl. 19-21 verður tikið ímóti góðum, heilum og reinum klæðum. Klæðir, ið innlatari ikki vil hava seld í Føroyum, skulu hava frámerki. Klútar! Tikið verður eisini ímóti slitnum seingjarklæðum o.l. úr bummull til klútar.
*Reyði Krossur Føroya, Vágsbotn 9*

**VINDEYGU TIL SØLU**
2 H-vindeygu, 3 lag glas h. 120 x b. 90 250 kr. stk. Vinarliga ringið eftir kl. 16
*Tlf. 256037/423414*

**TRAPPA**
Sera góð innitrappa úr góðum tilfari, hædd 220 br. 70 cm. til sølu vegna umbygging.
*Tlf. 313385/513385*

**20 DUNKAR**
av pistol håndværkerskum til sølu. Nakrar innhurðar við karmi til sølu.
*Tlf. 270427*

**STUÐULSKONSERT**
Hvat stuðulskonsert....? Ja, vit fara at hava stuðulskonsert við Magna Christiansen og Kirkjukóri í Vestmanna í Glæmuni í Kvívík 29. jan. 05 kl. 20.00. Børn hava atgongd saman við vaksnum.
*KFUM-skótarnir í Kvívík*

**TIL SØLU**
Flott kabinett til sølu, við Neon ljósið, og einari 400W streymveiting. sí http://heima.olivant.fo/~patur/kabinett/einast kr 400,-
*Tlf. 221051*

**SILVUR**
til tann føroyska kvinnubúnan av merkinum Víkingur frá Torgerð Suðuroy til sølu.
*Tlf. 226852*

**TIL SØLU**
Brúktur oljutangi tekur 1200 l, hevur staðið inni, er úr jarni. Prísur: 800,-
*Tlf. 319412/272805*

**BORÐTENNISBORÐ YNSKIST**
Brúkt borðtennisborð ynskist til keyps.
*Ring 509927*

**TIL SØLU**
Ein Apex-flogferðaseðil bíliga til sølu.
*Tlf. 361476*

**ER TAÐ NAKAR**
sum hevur helst 5 billettir, at selja mær til fólk og dólgar í kardamommebynum?
*ring 261166*

**NÝTT FLAGTAK ELLA NÝGGJA GRASPLENU Í VAR!**
Vit fara at skera nakað av flagi, so ætlar tú tær at leggja nýtt flag á takið ella gera nýggja græsplenu ella leggja flag á ein garð ella flaga ein skráa - ella bara slætta okkurt sum er óslætt. Ring til okkum og vit gera eina avtalu - so eru tit klár tá ein løta er í vár. Tað blíðkar fyri hugaðum monnum (og kvinnum). Gott nýggjár Miðstovugarður á Sandi, tlf. 361057 og 220203
*Tlf. 361057/220203*

# Hava verið á hvørjari hurð



*Á eystari armi á Skálafjørðinum gekk innsavningin uppá stás*

*Savnsmynd*

**Í Eysturoynni gekk innsavningin sunnukvøldið sum smurt. Ongir trupulleikar stungu seg upp, og góðar tveir tímar eftir byrjan høvdu innsavnararnir verið á hvørjari hurð**

INNSAVNAN

*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

**Skálafjørður:** Eins og alla aðrastaðni kring landið varð eisini savnað inn í Eysturoynni sunnudagin. Og eisini har gekk alt uppá stás, og innsavnararnir vórðu væl móttiknir.

Sunleiv Højgaard, formaður í Postfelagnum, samskipaði innsavningina uttanfyri Havnina. Tað vil siga, at uppgávurnar vórðu býttar út til álitisfólkini hjá Postfelagnum á teimum ymsu økjunum, sum síðani býttu uppgávurnar út einaferð afturat millum postboð og innsavnarar.

– Her á eystara armi á Skálafjørðinum høvdu vit 36 fólk í gongd, og tað tók bara góðar tveir tímar, so var alt yvirstaðið, greiðir Sunleiv Højgaard frá.

## Ongir trupulleikar

Sunleiv Højgaard letur ómetaliga væl at innsavningini. Ongir trupulleikar vóru at fáa fólk til arbeiðis hendan seinnapartin, og øll postboðini, eisini fyrrverandi postboð og onnur starvsfólk hjá Postverkinum fóru til verka sunnudagin.

Posthúsið í Saltangará varð brúkt sum savningsstað fyri eystara arm á Skálafjørðinum. Har varð møtt upp klokkan 14, og síðani varð innsavningin skipað víðari. Hvørt postboð fór á sítt øki saman við fimm øðrum innsavnarum.

– Eg eri ótrúliga takksamur fyri, at øll hava gjørt ein so stóran innsats. Tað er jú ókeypis arbeiði, men kenslan ein fekk aftaná av at síggja, at alt gekst so væl, var ótrúlig, sigur Sunleiv.

Sunleiv Højgaard er rættiliga vísur í, at øll hús hava havt vitjan av innsavnarum. Har fólk ikki hava verið heima, varð eitt giro-kort slept innum.

i
Sosialurin